## DAGSINS MEINING

# KT vinnan

Í hesum døgum er KT stevna í Norðurlandahúsinum, og er hetta eitt gott høvi at hugleiða eitt sindur um KT vinnuna í Føroyum.

Tað er einki at taka seg aftur í, at KT vinnan hevur nógv at týða í Føroyum, hóast hon enn ikki er tann stóra útflutningsvinna, ið hon kanska kundi verið.

KT er partur av so at siga øllum, og fáast hundraðtals føroyingar við hesa vinnu. Nógv áhugavert er at síggja og hoyra á KT stevnuni, og tykist alt ganga tann rætta vegin.

Tá tað kemur til útflutning, so eru onkrir glottar. Føroyskar KT fyritøkur hava nú í nøkur ár útflutt KT skipanir og loysnir, og aðrar fyritøkur tykjast vilja ganga somu leið. Hetta vísir, at tað skortar ikki við áræði og vilja millum privatu KT fyritøkurnar í Føroyum. Hví gongur tað so ikki skjótari at fáa ein munandi KT útflutning upp at standa? Tað er sjálvandi ikki løtuverk, og KT vinna er sum ein og hvør onnur vinna, har einki kemur av sær sjálvum. Tær føroysku fyritøkurnar, ið eru komnar eitt sindur á leiðis uttanlands, hava ikki verið bornar á lógvum.

Ger tað almenna nóg mikið á KT økinum? Ell rættari sagt, ger tað almenna tað rætta? Vit hava í mong ár sæð, at tað almenna mennir egnar skipanir. Kunnu hesar skipanir seljast? Um ikki, so burdi man heldur latið privatar fyritøkur ment skipanir hjá tí almenna eftir fríum útboði, við tí máli at ment skipanir, sum kundu verið seldar aðrasteðs.

Almenna og kommunala innkeypið av KT tænastum burdi verið fullkomuliga gjøgnumskygt við fríum útboði millum føroyskar fyritøkur. Tað er altíð ringt hjá einari føroyskari fyritøku at fara uttanlands og royna at selja til t.d. ein útlendskan almennan stovn, um fyritøkan ikki hevur víst, at hon klárar at levera til heimamarknaðin. Hetta hava føroyskar KT fyritøkur tó megnað, og so kunnu vit spyrja okkum sjálvi hvat tað almenna í Føroyum burdi hildið um tað. Sjálvrannsakan kundi verið eitt svar.

Áhugavert kundi verið at sæð tøl fyri, hvat tað almenna samanlagt hevur brúkt uppá KT seinnu árini, og hvussu nógv er spart og hvussu nógv av tí, ið ment er, kann seljast. Hevur man bara ment ósølubarar skipanir, so hevur tað almenna sín part av ábyrgdini fyri, at KT útflutningurin ikki er størri enn hann er. Ein og hvør almenn KT íløga eigur at uppnáa minst eitt av fylgjandi málum: Hækka tænastuna, ið borgarin merkir, spara starvsfólk ella spara pening. Og so burdu vit sett eitt mál afturat, nevniliga, at ein og hvør skipan skal verða sølubar ella útflutningsbar.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Spurningur til Bjarna Djurholm, landsstýrismann

**LISBETH L. PETERSEN**
løgtingslimur



Av tí at mær ikki varð tillutað tíð at seta fram fyrispurning á løgtingsfundi mikudagin 19 apríl, tá ófráboðaðir munnligir fyrispurningar vóru á skránni, havi eg valt at seta fram spurningin í bløðunum í staðin.

**Spurningur mín ljóðar soleiðis:**
Tann 8 september 2005 legði landsstýrismaðurin við Almanna- og Heilsumálum uppskot til samtyktar fram á løgting. Uppskotið, lm. nr. 6/2005, snúði seg um at seta nevnd viðvíkjandi øktum kvinnuleikluti í politikki.

**Uppskotið var soljóðandi:**
**Løgtingið tekur undir við, at landsstýrismaðurin setur eina nevnd at arbeiða fyri, at kvinnur fáa ein øktan leiklut í at taka politiskar avgerðir. Hetta er eisini beinleiðis í samsvari við uppskot til samtyktar um tilráðingar frá Útnorðurráðnum í 1999, sum Løgtingið samtykti 18. november 1999.**

**Í nevndini verða: Eitt umboð fyri hvønn flokk á Løgtingi, eitt umboð fyri Kommunusamskipan Føroya, eitt umboð fyri Kvinnufelagasamskipan Føroya og eitt umboð fyri Javnstøðunevndina. Varalimir verða valdir fyri allar limir.**

**Landsstýrismaðurin velur formannin. Nevndin velur sjálv næstformannin.**

Í viðmerkingunum varð nevnt, at arbeiðssetningurin hjá nevndini var m.a. at skipa fyri tvørpolitiskum tiltøkum til tess at økja um talið á kvinnum á Løgtingi og í kommunustýrunum kring landið. Tiltøkini skuldu eisini gera fólk varug við spurningin, og nevnd verða sum dømi upplýsing og lýsingarátøk, undirvísing og útgáva av ymiskum kunnandi tilfari. Um ársskiftið 2007/2008 skuldi nevndin handa landsstýrismanninum frágreiðing um virksemi sítt og tilmæli um, hvussu framhaldandi eigur at verða arbeitt fyri at fremja javnstøðu, har politiskar avgerðir verða tiknar.

Nevndin fekk 150.000 kr. árliga til arbeiði sítt.

Málið varð beint í trivnaðarnevndina, ið broytti orðingina eitt lítið sindur, men annars tók undir við málinum.

Í oktober mánað varð uppskotið samtykt við 28 atkvøðum fyri og 1 ímóti.

Í december mánaða, beint áðrenn løgtingið fór í jólafrí, var nevndin mannað og formaður valdur.

Í januar mánaða bleiv knappliga boðað frá, at nú hevði løgmaður flutt bæði javnstøðunevndina og hesa nýggju nevndina til málsøkið hjá landsstýrismanninum við Vinnumálum.

Samstundis fekk undirritaða frá løgmansfyristingini avrit av brævi frá løgmanni til landsstýrismannin við Vinnumálum, har løgmaður bað landsstýrismannin velja nýggjar limir fyri tey løgtingsumboðini, ið vald vóru, tí stýrisskipanarlógin forðaði fyri, at løgtingslimir sótu í nevndini.

Nú farið er um hálvan apríl, og løgtingið skjótt fer í summarfrí, er spurningur mín til landsstýrismannin Bjarna Djurholm:

**Hvar liggur málið í løtuni? Er nevndin mannað og nevndarformaður valdur?**

Sambandsflokkurin valdi beinanvegin, tá boðini komu, bæði umboð og varaumboð av nýggjum, men hesi umboð hava enn onki hoyrt frá landsstýrismanninum, síðan tey vóru vald, og tí verður hesin spurningur settur.

*Tórshavn, 19 apríl 2006.*

# Spurning til Hagstovu Føroyar

**FINNLEIF GUTTESEN**
Tvøroyri



Vit, ið búleikast í Suðuroy kunnu gleðast um, at Hagstovan kann staðfesta, at minkingin av arbeiðsleysum er størst í Suðuroy.

Mín spurningur er, um Hagstovan kann útgreina orsøkirnar til minkingina í Suðuroy.

Er tað veruliga fleiri arbeiðspláss?

At fulltíðararbeiðsloysið minkaði við 35 fólkum er gleðiligt, men hvussu nógv av hesum flutti úr Suðuroy? o.s.v.

Øll eru greið yvir, at flest øll, ið flyta úr Suðuroy eru ung og familjur við børnum, tað vil siga persónar, sum fyri størsta partin eru undir 66 ár, sum Hagstovan brúkar sum mark.




# Ein formaður og annar

**HANS PAULI STRØM**



Eg biði Tórbjørn Jacobsen fyrigeva mær, at eg eri komin at útnevna hann til nýklaktan formann í tingbólki Tjóðveldisfloksins. Tað rætta er, at hann er nývaldur formaður fyri starvsnevndina í flokkinum – tað er nakað annað, men kanska enn fínari. Ikki tí, so sum orðaskifti er í løgtinginum kann man lættliga fara skeivur av, hvør er teirra formaður har.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónssekreterur:** Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Lív Højsted Horsdal horsdal@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðsl-an ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.